


*Hetta skelti stavar frá skrivstovuni hjá Müller. Her nøvnini á skipunum*

## Johan í Djónastovu var skipari hjá Müller

Tað er áhugavert heilt til dagin í dag at hitta fólk, sum minnast so væl til Ebbu. Ein av teimum er 84 ára gamla Anna Elisabeth (Annebetta) Larsen av Eiði, sum er dóttir Johan Poulsen í Djónastovu. Hann var í mong ár skipari hjá Ebbu Müller, og hann førdi mest sluppina Tre Søskende.

Tað gjørdust sera góð viðurskifti millum húsfólkið hjá Johan og Ebbu. Annebetta minnist til, at einaferð, hon var í Havn 13 ára gomul, fór hon saman við vinkonum inn at vitja Ebbu. Sjálvt um Ebba hevði nógv um at vera, so var hon so sera blíð við hesar eiðisgenturnar. Hon gav teimum, táið tær fóru, 50 oyru í part, so tær kundu fara í biograf.

Tey fingu eisini fast til jóla jólakort frá Ebbu, og tey byrjaði altíð "Kære Kaptajn". Kúgv fingu tey eisini frá Poul Müller, svági Ebbu, og kúgvan var bert kallað Müller.

Undir krígnum sluppu danir í Føroyum ikki at vitja ættina í Danmark. Men Ebba plagdi tá saman við konu Hilbert, amtmannin, at koma til Eiðis at ferðast. Eina ferð komu komu tær norður við einum armeraðum trolara.

Tær leigaðu hús á Eiði og høvdu eisini arbeiðskonu. Tær vitjaðu eisini inn í Djónastovu.

Synir Ebbu, Ebbe og Eiden, plagdu eisini javnan at koma norður at ferðast, so leingi teir livdu.

Annebetta hevur tískil sera góð minni um Müllerfólkini fyri teirra trúfesti.

## Góð at arbeiða hjá

Anna Bertha Mohr í Havn arbeiddi hjá "frú Müller", sum hon altíð varð kallað, árini 1949-51, tá ið hon eisini gekk í (kvøld)handilsskúla í Havn.

Tað vóru tvær arbeiðsgentur í húsinum, onnur var í køkinum og hin var í stovuni. Hetta kann kanska ljóða ríkiligt. Men tað var kortini nóg mikið at gera, tí hentleikarnir vóru ikki sum í dag og nógv var um at fara.

Sentralvarmi var einki sum æt tá. Í hvørjum ovni skuldi kykast við koli, sum var fittliga arbeiðskrevjandi.

Hetta var eisini eitt sera livandi hús, har nógv virksemi var. Í sama húsi var eisini avgreiðsla hjá DFDS, so her komu nógv viðskiftafólk bæði í samband við ferðaseðlakeyp og farm.

Á skrivstovuni arbeiddu trý fólk umframt Ebbu. Tey vóru sonurin Ebbe, C.F. Hansen og Petur Egholm. Hvønn dag komu tey inn í íbúðina at drekka kaffi. Táið ferðamannaskipið Drotningin kom á Havnina, vóru allir yvirmenninir heima hjá frú Müller og fingu morgunmat.

Tað var ikki altíð ein sjálvfylgja í "fínum" húsum, at herskapið át saman við tænastufólkunum, men her ótu tey øll saman.

Samanhaldið var gott í hesi lítlu familju. Ebbe við familju búði uppi á í húsinum. Eiden og Mia plagdu saman við soninum, tey áttu tá, at koma oman til mammuna leygardagar. Har gistu tey eisini og vóru so til døgurða dagin eftir. Annars kom Eiden hvørt kvøld inn á gólvið hjá mammuni.

Jólini vóru serliga hugnalig. Tá vóru tey fast 15 fólk. Umframt sjálv familjan komu eisini danir, sum búðu í Føroyum. Ein av teimum var frk. Cohr, sum



*Tað var ein smeitur hjá Ebbu, tá ið Nólsoy gekk burtur í 1934 við 18 monnum*

ikki toldi, at tað ikki var tosað danskt við hana. Men soleiðis var frú Müller ikki. Fólk vóru eins vælkomin at tosa føroyskt sum danskt við hana.

Til jólahaldið plagdi svigarinnan Margretha (Gugga) at spæla klaver.

Ebba var trúføst móti sínum gomlu arbeiðsfólki. Petra Danielsen, ættað úr Svinoy, var eisini ein fastur gestur á jólum. Hanna á Kletti, ein onnur gomul arbeiðskona, lá eina ferð sjúk, og tá varð Anna Bertha send heim til hennara við mati.

Onkuntíð var eisini selskap, og millum aðrar gestur vóru amtmaðurin. Olevina, dóttir Andreas á Kletti í grannalagnum, var fastur kokkur.

Ebba Müller føldi eisini ábyrgd fyri hesi ungu gentu av Strondum, sum kom í húsið, og hon helt eisini sambandið eftir, at Anna Bertha var farin. Eina ferð, tá ið hon var niðri og Ebba Müller var í Danmark og vitjaði systur sína Gudrun, ringdi Ebba eftir Onnu Berthu at bjóða henni at eta saman við teimum.

## Asylið

Eitt annað dømi um ta umsorgan Ebba hevði fyri sínum medmenniskjum var Asylið. Um henda felagsskap skrivaði Randi Jacobsen í Kvindebiografisk Leksikon:

Under depressionen i 1930'erne og også senere gjorde Ebba Müller en stor indsats for at hjælpe familier i små kår. I 1935 oprettede hun det såkaldte Asyl. En gang om ugen samledes nogle damer hjemme hos hende for at strikke sokker, trøjer m.m., som ved juletid blev uddelt i diskrete pakker til børn af trængende familier. Byens læge udleverede en liste over, hvilke familier der havde det sværest, og hvor mange børn de havde. Asylet fik økonomisk støtte fra virksomheder og enkeltpersoner til at købe garn. Senere sendte Asylet også julepakker til fattige



*Ebba Müller er, hóast donsk, ein partur av føroysku søguni*

familier uden for Tórshavn. De ugentlige sammenkomster hjemme hos Ebba Müller tjente samtidig som en litterær klub. Det skete også, at hun inviterede mindrebemidlede til et måltid mad hjemme hos sig selv. Kvinder i Tórshavn kunne tjene lidt penge ved at sælge strikvarer til de skibe, som anløb havnen; den mulighed havde kvinderne andre steder på øerne ikke. Det inspirerede i 1935 Ebba Müller til sammen med nogle embedsmandsfruer og højskolefolk at oprette foreningen Føroysk Heimavirki til støtte for hjemmeindustrien. Foreningen fik en butik i Tórshavn, som opkøbte varer, kontrollerede deres kvalitet og solgte dem, dels på Færøerne, dels i Danmark gennem Selskabet til Haandarbejdets Fremme. Bortset fra et par år under Anden Verdenskrig var Ebba Müller formand for foreningen til sin død i 1967.

**Næstu ferð**

Tann 26. marts fyri 80 árum síðan fór Ernestina á land á Suðurlandinum í Íslandi. Bjargingin av manningini er sera kend. Í komandi pørtum fara vit at savna saman tað tilfar vit hava um hesa vanlukkuna og um lagnur í hesi søgu

Sosialurin